## Visti tú....

at av samlaðu lønargjaldingunum uppá 6,4 mia.kr. í 2006, vóru 64 prosent goldin til mannfólk. Av inntøkuni hjá mannfólkunum stavaði 22 prosent frá fiskiskapi og 20 prosent frá almennari fyrisiting og tænastu.



# Nólsoy: Ljóðar ógvuliga spennandi

**Eitt uppskot er á veg í tingið, sum í stuttum gongur út upp á, at skjøtil verður settur á at byggja eina altjóða floghavn. Uppskotsstillararnir leggja seg ikki fastar á nakað ávíst øki í landinum. Men Nólsoy ljóðar spennandi**

FLOGVØLLUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fimm tinglimir út fýra ymiskum flokkum hava lagt eitt uppskot fyri tingið, sum í stuttum gongur út upp á at byggja ein altjóða flogvøll í Føroyum, sum er í minsta lagi 2200 metrar langur, við møguleika fyri leingjan. Eisini verður skotið upp, at flogvøllurin verður útgjørdur við PAC II (Precision Approach Category) ella III. Hetta merkir, at innflúgvingin kann fara fram í øllum líkindum, eisini í greytatjúkkum mjørka.



*Poul Michelsen sigur, at teir flogskiparar, hann hevur tosað við, eru sera positivir mótvegis tankanum um, at gera floghavn í Nólsoy*

Í viðmerkingunum verður sagt: »Uppskotsstillararnir treyta sær ikki, at flogvøllurin skal liggja á ávísum staði, men sjálvandi har, best er at leggja hann«. Tað vil við øðrum orðum siga, at eingin treyt er løgd við, at til dømis byggjast skal á Glyvursnesi.

Ein av uppskotsstillarunum er Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum, og spurdur um møguleikan fyri at leggja vøllin í Nólsoy sigur hann, at hetta ljóðar ógvuliga spennandi.

- Nú kenni eg av góðum grundum ikki so væl til uppskotið. Magnus Hansen hevur víst mær skitsuprojektið og greitt mær frá tí, sum hann hevur gjørt sær tankar um. Og eg má siga, at tað ljóðar ógvuliga spennandi, men eg má eisini undirstrika, at tað verður ikki eg, men serfrøðin, sum má taka støðu til, hvar best er at leggja ein slíka flogvøll, sigur Poul Michelsen.

### Flogskiparar: Sær gott út

Tá vit fingu fatur á Poul Michelsen var tað næstan lagnunnar speisemi, at hann júst var lendur aftur í Stavanger eftir at hava verið ávegis til Føroya – í tveir dagar. Í gjár var ikki lendandi fyri mjørka, og í dag var tað vindurin, ið spældi inn.

Tingmaðurin sigur, at tað fyri hann eins og hinar uppskotsstillararnar ikki er avgerandi, hvar flogvøllurin liggur, bara hann kemur.

- Tað hastar ikki. Tað, sum ræður um, er at fáa gjørt neyðugu kanningarnar og hava neyðugu fortreytirnar at taka støðu út frá. Tá so allir valmøguleikarnir fyriliggja, kunnu vit taka støðu til plaseringina, sigur Poul Michelsen.

Hann sigur víðari, at á ferðini hevur hann havt høvið at tosa við flogskiparnar báðar um møguleikan at leggja eina floghavn í Nólsoy, og fyri báðar var galdandi, at teir mettu hetta verða eina frálíka loysn. Ikki minst tí, at her er møguleiki fyri einum krossvølli, so tú altíð kanst lenda móti vindinum.

Tey, sum hava sett uppskotið fram, eru Torbjørn Jacobsen og Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum, Lisbeth Petersen úr Sambandsflokkinum, Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum og Bill Justinussen úr Miðflokkinum. Talan er sostatt um bæði tvørfloksligt og tvørpolitiskt uppskot.

# Yvirhøvur vælvild

**Tað var lítil mótstøða at merkja móti uppskotinum um flogvøll í Nólsoy, tá Sosialurin loddaði dýpið umborð á Rituni**

FLOGVØLLUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jógvan Thomsen var seinasti borgarstjóri í Nólsoy undan samanleggingini við Havnar Kommunu. Hann er eisini formaður í Junkarshaganum. Og honum líkar uppskotið sera væl*

*Mynd: Leo Poulsen*



*René Hansen er seyðamaður í Heimarhelvt. Eisini honum líkar væl hugskotið. Konan, Paula, er meiri áhugað í møguleikanum fyri undirsjóvartunli út til Nólsoyar*

*Mynd: Leo Poulsen*

Tað var sum vera man mikið prát um uppskotið um at gera flogvøll á Borðuni í Nólsoy fyrradagin umborð á Rituni, eftir at Sosialurin hevði borið uppskotið alment fram.

Onkur hevði okkurt fyrivarni, men yvirhøvur tóku nólsoyingarnir væl ímóti uppskotinum hjá Magnusi Hansen.

Summi fokuseraðu meiri upp á tann veruleika, at skal flogvøllur gerast í Nólsoy, so verður neyðugt eisini at gera ein undirsjóvartunnil út í oynna. Tað er eftir øllum at døma nakað, sum í hvussu er summir nólsoyingar ganga og droyma um.

Tað vóru spennandi møguleikarnir heldur enn tað árin, ein slík ætlan annars hevði havt á umhvørvið og oynna sum heild, ið fólk tóku fram. Og tað er einki at taka seg aftur í, at ein slík ætlan gevur óánaðar møguleikar fyri fólkið í oynni, tað sigur seg sjálvt.

Og nú landsstýrismaðurin hevur úttalað seg um, at hann ynskir møguleikan kannaðan, er uppskotið ikki longur bara ynskidreymur og luftkastellir, men ein ítøkiligur møguleiki.

### Alt í einum

Sjálvt um vit fyri tað mesta slotaðu og ikki tóku so dúgliga lut í prátinum, spurdu vit ítøkiliga tveir av teimum, sum dagliga ferðast við Rituni til Havnar til arbeiðis, men sum hava rættiliga nógv við hagarnar í Nolsoy at gera, hvat teir hildu.

Jógvan Thomsen, fyrrverandi borgarstjóri í Nólsoy og stjóri á Fjarskiftiseftirlitinum, er eisini formaður í einum av hagunum í Nólsoy, Junkarshaganum, sum er mittasti hagin í oynni. Hesin hagin verður rættiliga nógv merktur av ætlanunum, verða tær til nakað.

- Hetta er eitt frálíkt hugskot. Her fær mann alt í einum. Plássið er slætt og tú fær tvær flogbreytir, og tú sleppur heilt undan turbulensi. Tað er veðurgott og tú kanst lenda í so at siga øllum líkindum. Og eg dugi ikki at síggja, at hendan ætlanin á nakran hátt fer at ávirka ætlanina um Nólsoy sum grøna oyggj, sigur Jógvan Thomsen, sum eisini er limur í trímannanevndini, sum arbeiðir fyri Nólsoy sum grøn oyggj.

Eisini René Hansen, sum í mong ár hevur verið seyðamaður í Heimaruhelvt, sum verður lítið og einki ávirkað av einum møguligum flogvølli, er positivur, men ger samstundis greitt:

- Logiskt sæð er ætlanin bæði skilagóð og áhugaverd. Men verður hon framd mugu vit gera okkum greitt, at Nólsoy verður ikki tann oyggin, vit kenna í dag.